# Reiðarafelagið fyri Farmaskip
# Nevndarfrásøgn 2015




VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Reiðarafelagið fyri Farmaskip**

Vinnuhúsið
Óðinshædd 7
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Um felagið

Reiðarafelagið fyri Farmaskip (RFF) er sambært viðtøkunum felag fyri reiðarar og eigarar av føroyskum farmaskipum.

Endamál felagsins er at savna allar reiðarar fyri føroysk farmaskip til at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum farmaskipum, eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna.

RFF er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Hesi seinnu árini er felagið munandi vaksið og telur í dag 23 limir umboðandi 75 skip.

Myndin á forsíðini er av Hans á Bakka, sum gjørdist limur í RFF í 2015

Í nevndini í RFF sita:

Jens Meinhard Rasmussen, formaður
Hentzar Steingrímsson, næstformaður
Gunnbjørn Joensen
Rúni V. Poulsen
Jónas Sigmarsson
Sjúrður Johansen
Bogi P. Nielsen

# Yvirlit yvir limirnar

| Limir í RFF | |
|---|---|
| 6. september 2006 P/F | Samskip P/f |
| All Oceans Logistics Sp/F | SC Nordic Sp/F |
| Bal-Bulk P/F | Silver Liner Faroe Islands Sp/f |
| Bakkafrost Farming | Skipafelagið NorLines Sp/f |
| Faroe Ship P/f | Smyril Line P/F |
| Havnarnes Sp/F | SVITZER Faroe Islands P/F |
| Karmsund Sp/F | Team Beredskab Sp/F |
| Mariner Sp/f | Thor P/F |
| Minor P/F | Thun Sp/F |
| Nolsø Shipping Sp/F | Tindhólmur |
| Nordvaag Sp/F | Wergeland Sp/F |
| Northern Shipping Sp/f | |

# Frásøgn nevndarinnar

Í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip (RFF) eru nú 23 limir, sum umboða 75 skip og eina samlaða tonnagu á knapt 350.000 BT. Felagið er sostatt eitt av størstu vinnugreina- og arbeiðsgevarafeløgum í landinum.

Limatalið í RFF er hækkað nógv, samstundis sum talið av skipum í altjóða skipaskránni FAS hækkaði. Tá hugsað verður um, at talið av skipum í FAS nú er 89, og at 75 skip eru í RFF, er týðiligt, at stórur partur av reiðaríunum, sum eru í FAS, velja at lata seg umboða í RFF. Nú talið av skrásetingum í FAS er meira støðugt, ger tað sama seg sostatt galdandi fyri limatalið í RFF.

Hóast minni vøkstur júst nú, er henda vinnugreinin framhaldandi týdningarmikil fyri føroyska samfelagið.

Lønarinntøkur undir FAS (1.000 kr)




Kelda: TAKS

Hetta sæst eisini á grafinum omanfyri, har tað er týðiligt, at lønirnar, sum eru útgoldnar undir FAS, støðugt hækka. Lønarinntøkurnar eru meira enn tvífaldaðar hesi árini síðan 2010, og gevur shipping og FAS skipanin sostatt eitt munandi ískoyti til peningarenslið inn til Føroya.

Tað er ymiskt, hvussu árið hevur hilnast í vinnuni. Offshore er sum heild í svárari kreppu og hevur stórar avbjóðingar fyri framman vegna kollaps í oljuprísum og minkandi leitivirksemi. Harumframt ávirka støðan í Russlandi og stórar korruptionsgølur í Brasilia marknaðin neiliga. Kreppan væntast at verða long.

Fyri aðrar partar í vinnuni gongur betur. Tangaskipsmarknaðurin hevur havt eina positiva gongd í seinastuni, og lækkandi oljuprísir hava eisini havt eina jaliga ávirkan á partar í vinnuni.

Kappingin er sum altíð hørð, tí reiðaríini virka á altjóða marknaðinum. Tí er tað umráðandi fyri vinnugreinina framhaldandi at hava støðugar karmar og at vera kappingarfør í mun til reiðaríir undir øðrum flaggi. Umframt at vinnan sjálvsagt javnt tillagar seg til umstøðurnar, so hevur tað, sum nevnt er fleiri nevndarfrásøgnum undan hesari, týdning, at føroysk lóggáva, reglur og umsiting ikki leggur óneyðugar byrðar á vinnuna. Tað eru millum annað viðurskifti í sambandi við FAS, sum eiga at verða dagførd, soleiðis at føroysk skip kunnu kappast á jøvnum føti við onnur. RFF hevur javnan samband við politikarar og umsiting, soleiðis at ikki óneyðugir fótonglar verða lagdir fyri vinnuna.

Undan valinum í september 2016 vísti RFF á, at tørvur var á eini yvirskipaðari maritimari strategi. Felagið fegnast tí um, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tikið stig til hetta og hevur sett ein bólk at gera uppskot til eina maritima strategi. Esther Dahl luttekur í bólkinum vegna Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Í fjør gjørdi RFF eina limakanning, sum hevði til endamáls at útgreina ávís viðurskifti millum limirnar.

Út frá kanningini ber til at staðfesta, at umsetningurin hjá limunum í felagnum tilsamans er millum 1,5 og 2 mia. Hetta stuðlar undir tað, sum sagt verður longri frammi, at talan er um eina stóra og týðandi vinnugrein í Føroyum.
Eisini vísir kanningini ítøkiliga, at vinnan leggur nógv eftir seg á landi við m.a. tryggingum og umsiting av feløgunum. Bara í umsitingini hjá reiðaríunum starvast yvir 100 fólk.

Ískoytið til føroyska samfelagið sæst ikki bert aftur í mun til krónur og oyrur, men eisini tá tað kemur til samfelagsligar skyldur. Millum annað við at gera tað møguligt hjá komandi føroyskum yvirmonnum at nema sær neyðugu praktisku førleikarnar til sjós.

Kanningin vísir, at stórur partur av sjófólkunum eru sett eftir føroyskum sáttmálum ella eftir sáttmálum, sum eru góðkendir av føroysku manningarfeløgunum.

Tað er at fegnast um, at vinnugreinin er við at fáa grundfesti í føroyska vinnuliga landslagnum, og

hetta kann verða við til at tryggja, at hon eisini framhaldandi verður tað. Maritima strategiin, sum er nevnd omanfyri, kann tryggja grundfesti enn meira, um rætt verður farið fram.

Í september 2014 gjørdist RFF limur í International Chamber of Shipping. Í august 2015 vitjaði aðalskrivarin í ICS, Peter Hinchliffe, RFF. Hann hitti umframt nevndina í RFF eisini landsstýrismannin í vinnumálum, og vitjaði á Vinnuháskúlanum.

ICS er altjóða felagsskapur fyri national reiðarafeløg kring heimin. RFF hevur fullan limaskap har og hevur ein sess í nevndini. Í løtuni er tað Jens Meinhard Rasmussen, sum umboðar RFF í nevndini fyri ICS. RFF metir limaskapin hava týdning, m.a. tí at ICS er ein týdningarmikil hoyrings- og ráðgevingarpartur í mun til IMO, har altjóða sáttmálar innan vinnugreinina verða tilevnaðir og samtyktir.

ICS útgevur hvørt teirra "Flag State Performance Table". Á tí talvuni stendur føroyska skrásetingin seg væl. Á øllum økjum, har vit hava neyðuga virksemið, stendur føroyska flaggið seg ógvuliga væl, og tað fegnast RFF um. Eitt av endamálunum við talvuni er at geva vinnu og myndugleikum eitt amboð at arbeiða eftir í mun til dygd, og metir RFF, at júst hetta samstarv millum myndugleikar og vinnu er gott í Føroyum.

Gongd er nú komin á tiltrongdu aspirantskipanina. Fyrstu navigatøraspirantarnir á Vinnuháskúlanum hava nú verið til sjós og eru komnir aftur á skúlan. Enn er ov tíðliga at siga, hvussu hon fer at roynast, men tað sær út til, at hon fer at eydnast væl. Krav til fyrstu aspirantarnar var, at teir høvdu miðnám, men støðan hjá RFF er, at tað eigur at bera til at byrja sum aspirantur, uttan at krav verður sett um miðnám.

Trupulleikin við, at føroyska flaggið er lýst sum Flag of Convenience í ITF høpi, er framvegis ikki loystur. Føroyska røddin í ITF eru føroysku manningarfeløgini, og tað tykist tíverri ikki at liggja teimum frammarlaga at fáa loyst trupulleikan. Hugtakið Flag of Convenience er ikki viðurkent av RFF og heldur ikki av ICS. RFF roynir hóast hetta áhaldandi at fáa trupulleikan loystan, tí hetta tíverri hevur negativa ávirkan á flotan.

Samanumtikið er at siga, at menningin av FAS hevur økt talið av skrásettum skipum í FAS munandi og harvið eisini talið av limum í RFF. Skipanin sær nú út til fyribils at vera komin á eitt stabilt støði, men fer uttan iva at vaksa aftur, tá gongdin í vinnugreinini batnar. RFF er tó ikki felagsskapur bert fyri reiðaríir í FAS, men allar reiðarar í føroyska handilsflotanum. M.a. gjørdist Hans á Bakka limur í felagnum í 2015.

Umframt øktar inntøkur hjá sjófólki, so hevur vinnugreinin við sær munandi størri virksemi á landi. Beinleiðis virksemi á landi er umsitingin hjá reiðaríunum. Avleidda virksemi er fjølbroytt, men her kunnu eitt nú verða nevnd reiðarívirksemi, skeiðsvirksemi umframt trygging og fígging av virksemi og skipum hjá limunum. Vinnugreinin, um RFF umboðar, hevur tó stórar avbjóðingar í komandi tíðum. Ávís viðurskifti eru, sum ganga rætta leið, men tað er neyðugt alla tíðina at halda sær fyri eyga, at reglur, mannagongdir og lóggáva í Føroyum ikki virkar kappingaravmarkandi fyri føroysk reiðarí.

**25. februar 2015**

**Nevndin í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip**
**Jens Meinhard Rasmussen, formaður**

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY